**Samtykki til fyribyrgjandi og heilsufremjandi heilsukanningar hjá heilsufrøðingi**

Navn á næmingi ___________________________________ P-tal ____________________

Gigni biður hervið um samtykki til, at barn tygara kann taka lut í vanligum fyribyrgjandi og heilsufremjandi heilsukanningum hjá heilsufrøðingi, sum Gigni bjóðar øllum skúlabørnum.

Heilsufrøðingurin bjóðar vegleiðing um heilsu, menning og trivnað.

Umframt at gera funktiónskanningar (sjón, hoyrn, hædd, vekt), hevur heilsufrøðingurin eisini persónligar samrøður við barnið, eins og bólka- og floksundirvísing við ymiskum viðkomandi evnum. Vegleiðing verður eisini veitt til foreldur og starvsfólk á skúlunum.

Harumframt skal heilsufrøðingurin eygleiða heilsuviðurskiftini og trivnaðin hjá einstaka barninum eins og almennu umstøðurnar fyri hesum, soleiðis at heilsufrøðingurin kann gera eina meting av heildarumstøðunum hjá barninum. Virksemið hjá heilsufrøðinginum fer vanliga fram á skúlunum.

Tá tað ikki er eitt krav, at títt barn skal vera við til hesar fyribyrgjandi og heilsufremjandi heilsukanningarnar, so er neyðugt, at tú sum foreldur gevur títt samtykki til, at títt barn kann taka lut í hesum heildartilboðnum, sum fevnir um alla skúlagongdina hjá barninum. Nærri upplýsing um tilboðið, sum Gigni vanliga veitir til øll skúlabørn, er at finna á www.gigni.fo.

Tá títt barn fær innkalling til almenna heilsukanning hjá heilsufrøðingi, fært tú skrivliga kunning um hetta, soleiðis at tú hevur møguleika at seta teg í samband við heilsufrøðingin, um tú kennir tørv á hesum, áðrenn hann tosar við títt barn.

Heilsufrøðingurin biður um serligt samtykki til eyka kanningar ella samrøður, um tørvur skuldi verið á hesum, undir skúlagongdini hjá barninum.

Tú kanst altíð taka aftur títt samtykki.

Samtykki og undirskrift

- ○ Eg gevi við hesum mítt samtykki til, at mítt barn kann taka lut í vanligum fyribyrgjandi og heilsufremjandi heilsukanningum hjá heilsufrøðingi, sum Gigni bjóðar øllum skúlabørnum.
- ○ Eg gevi samtykki til, at heilsufrøðingurin tosar við flokslæraran í samband við, at ein flokkur verður kannaður.
- ○ Eg ynski **ikki** at geva mítt samtykki til, at mítt barn tekur lut í vanligum fyribyrgjandi og heilsufremjandi heilsukanningum hjá heilsufrøðingi, sum Gigni bjóðar øllum skúlabørnum.

Foreldur :___________________________________________________________________________

________________________ ____________________
Dagfesting Undirskrift

**Verður vinaliga at lata aftur til undirritaða heilsufrøðing**

_______________________________________ _________________________________________________
Navn á heilsufrøðingi Navn á skúla

_______________________________________ ____________________
Undirskrift og dagfesting Telefonnr.

Niels Finsensgøta 37
Postboks 132
110 Tórshavn
TEL: +298 562 300
EMAIL: gigni@gigni.fo
www.gigni.fo

**Reglur um samtykki**

Reglur um samtykki eru at finna í løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum, har tað í § 2, nr. 8 er ásett, at við samtykki frá tí skrásetta skal skiljast: “Eitt sjálvboðið, nágreiniligt og kunnað viljaboð frá skrásetta um, at upplýsingar um ein sjálvan kunnu viðgerast”.

Sambært § 29 kann skrásetti taka eitt samtykki aftur.

Eisini er m.a. krav um, at Gigni sum dátuábyrgdari skal ansa eftir, “at persónsupplýsingarnar lúka hesar treytir:

1) Eru loyvdar at viðgera,
2) bert verða savnaðar saman til eitt nágreiniliga tilskilað endamál, sum er sakliga grundað í virksemi dátuábyrgdarans, og at seinni viðgerð samsvarar hesum endamáli,
3) bert verða viðgjørdar, um tær eru viðkomandi og ikki fevna um meira enn krevst fyri at røkja endamálið við innsavnanini og tí víðari nýtsluni av upplýsingunum,
4) ikki verða nýttar til onnur endamál, sum ikki samsvara upprunaliga endamálinum, uttan so at skrásetti hevur givið sítt samtykki,
5) verða varðveittar soleiðis, at ikki er gjørligt at eyðmerkja skrásetta longur enn neyðugt við atliti at endamálinum við viðgerðini, og
6) eru beinar og verða nøktandi dagførdar. Nøktandi eftirlit skal tryggja, at persónsupplýsingar, sum eru rangar ella villandi, skjótast verða rættaðar ella strikaðar.”

**Brot úr løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung**

§ 1. Fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung skulu gera sítt til at tryggja teimum best møguligar fyritreytir fyri einum heilsugóðum uppvøkstri og vaksnamannalívi.

§ 6. Børn, sum eru farin í forskúla, og børn og ung í undirvísingarskyldugum aldri skulu fáa tilboð um fyribyrgjandi og heilsufremjandi heilsukanningar hjá heilsufrøðingi. Heilsufrøðingurin skal bjóða vegleiðing um heilsu, menning og trivnað. Harumframt skal heilsufrøðingurin eygleiða heilsuviðurskiftini hjá einstaka barninum eins og almennu umstøðurnar fyri hesum.
Stk. 2. Virksemið hjá heilsufrøðinginum sambært stk. 1 fer vanliga fram á skúlunum.

Niels Finsensgøta 37
Postboks 132
110 Tórshavn
TEL: +298 562 300
EMAIL: gigni@gigni.fo
www.gigni.fo